Føroyar partur av altjóða oljumentan

– Føroyingar mugu ikki billa sær inn einsamallir at kunna megna alt. Oljuvirksemið er eitt altjóða virksemi við nógvum ymiskum mentanum. Tað er týdningarmikið, at Føroyar taka lut í altjóða oljumentanini eisini og ikki bara sita í sínum egna dunnuhyli í Føroyum. Tað hava tað verið tekin til tíverri. Skal man vera ein tjóð sum ynskir at átaka sær at fremja egin áhugamál og tey hjá oljuídnaðinum, so má man eisini hava altjóða áhuga og innlit sigur Alex Buvik, fyrrv. ráðgevi hjá oljumyndugleikunum

OLJUPRÁT
Jan Müller
jan@sosialurin.fo

Alex Buvik, oljuráðgevi: -Oljutilgongdin hevur verið skilagóð higartil

Alex Buvik hevur arbeitt hjá føroysku oljufyrisitingini í fleiri ár og hevur staðið á odda fyri trygdini í sambandi við boriskráirnar hjá oljufeløgunum. Beint áðrenn 2. útbjóðing varð skrivað út fór hann aftur til Noregs at arbeiða sum ráðgevi. Men áðrenn hann og konan løgdu leiðina til heimlandið, fekk Sosialurin orðið á hann.

Alex Buvik ivast onga løtu í, at tað finst olja í føroysku undirgrundini. Hon er longu staðfest í fleiri av brunnunum. Jarðfrøðiligar fortreytir eru fyri at finna olju, spurningurin er bara, hvar hon liggur goymd. Hann vísir so eisini á, at økið, har tað higartil er borað, er bert ein evarska lítil partur av øllum landgrunninum. - Eg haldi, at kolvetni eru í føroysku undirgrundini, og tað í lønandi nøgdum undirstrikar rættiliga avgjørdi norðmaðurin.

Alex Buvik var í Føroyum í 8 ár. Hann kom higar í 96. Byrjaði fyrst sum ráðgevi fyri oljufyrisitingina og tók so við føstum starvi í mai 96. Hann varð settur til at vera við til at skipa eitt regulverk, ja leggja sjálva strategiina fyri heilsu, umhvørvi og trygd í sambandi við eina oljutilgongd við eitt nú stórum boripallum á føroyskum havøki. Og tá komið var á mál at skipa reglur fyri boripallar ol., varð so farið undir at skipa reglur fyri leiting og seinni aftur fyri allari framtíðar tilgongdini við útbygging og framleiðslu og flutningi og loksins við avtøku av øllum.

Alt hetta arbeiðið, heldur Buvik, varð rímuliga væl móttikið av oljuvinnuni.

Sum frá leið komu boringarnar. – Eftir fyrstu boringina høvdu vit fingið ein greiða fatan av, hvussu hetta skuldi skipast í Føroyum. Arbeitt varð víðari at gera eitt regulverk til 4. brunnurin varð boraður. Tvs. at tað varð nú miðjað móti at hava eitt samlað regulverk fyri allar oljutilgongdirnar frá leitiborings til framleiðslu og loksins til flutning av oljuni og til burturbeining av pallum og útbúnaði, tá oljan einaferð er uppi. Alt hetta arbeiðið varð gjørt liðugt fyrr í ár og latið landsstýrismanninum. So ein kann væl siga, at Alex Buvik hevur verið við til at byggja upp frá A til Z – tað so týdningarmikla lógar- og regulverkið, sum skal tryggja, at alt fer rætt fram í sambandi við eina komandi oljutilgongd við Føroyar.

– Harvið er tað arbeiði eg varð settur til at gera liðugt. Og orsakað av lítlum virksemi er tað eisini náttúrligt fyri meg at enda sáttmálan og so møguliga koma aftur, tá boringarnar byrja aftur og tá vera við til at góðkenna oljufeløgini, oljupallarnar og oljuleiti-virksemi, tá teir írestandi fýra brunnarnir skulu borast. Tað verður so neyvan fyrr enn um knøpp tvey ár.

– Hvussu væl hevur so hetta arbeiðið hepnast spurdi vit Alex Buvik?

– Eg haldi tað hevur hepnast sera væl. Vit hava verið serstakliga heppin, tí stóru londini kring okkum hava gjørt eitt stórt forarbeiði fyri okkum. Tað hava vit brúkt men tilpassað tað til nútíðina og viðurskiftini í Føroyum. Har meini eg, at man er farin burtur frá at gera eitt regulverk út í hvønn smálut. Ístaðin siga vit oljufeløgunum, hvat samfelagsstøðið - standardurin er fyri heilsu, umhvørvi og trygd. Ikki hvussu tey skulu gera tað. Tað gera feløgini sjálvi við at brúka altjóða standardir. Vit hava so eitt regulverk, sum so tekur altjóða standardirnar við. Vit skapa karmarnar, sum oljufeløgini so fylla út.

Alex Buvik dylur heldur ikki fyri, at oljufeløg sum eitt nú BP halda føroyska regulverkið vera nakað av tí besta í heiminum.

– Tá eg kom til Føroya at arbeiða við hesi uppgávuni var tað eisini mítt mál at betra um tað, sum longu fanst í øðrum londum. Og sjálvur haldi eg hetta hevur eydnast okkum. Buvik heldur sjálvur, at føroyingar eiga at kenna seg tryggar við tað regulverk, sum er gjørt, havandi í huga, at ein stórur oljuídnaður kann taka seg upp ein dag.

Basaltið

Hvussu sær Alex eina komandi oljutilgongd fyri sær?

– Føroyar eru ein oljuprovins við bæði høgum váða og kostnaði. Oljuídnaðurin fer har í verðini, har kostnaðurin er lægstur og váðin ikki er so stórur. Føroyski trupulleikin er basalt. Í økjunum, har tað longu er borað, finst einki basalt. Men tey økini, sum nú eru áhugaverð, eru fjald av tjúkkum basalti. Tað er trupult at avlesa undirgrundina gjøgnum basaltið. Haraftrat gongur tað seinri at bora gjøgnum basalt. Tað merkir, at boripallarnir mugu vera her longri og kosta tí nógv meira.

Nú verður so roynt at finna eina tøkni, sum ger tað lættari at siggja og bora gjøgnum basaltið. Verða hesar gáturnar loystar, so hava Føroyar stórar møguleikar. Men tað er ov tíðliga at siga, hvussu verður við at loysa hesar so grundleggjandi spurningarnar.

– Hava vit so gjørt mistøk hesi árini?

– Tað tekur tíð at finna olju. Nú hevur so verið arbeitt miðvíst við hesum í meira enn 10 ár, og tað er ikki nógv sað í altjóða høpi. Haldi ikki at stór mistøk eru gjørd. Áhugin hevur verið stórur frá oljufeløgunum frá byrjan. At feløgini kanska vóru í so bjartskygd tá, haldi eg tey sjálvi mugu taka ábyrgdina av. Vit hava altið verið eitt sindur varin við hesum bjartskygninum.

– Hvat er tað besta, sum er hent, meðan tú hevur verið her?

– Tá vit byrjaðu so smátt um miðjan 90-ini varð GEM verkætlanin sett á skránna. Hetta var eitt stórt altjóða projekt, sum skuldi kortleggja data við Føroyar, á havbotninum, í sjónum og í umhvørvinum sum heild. Hetta var eitt stórt projekt fyri føroyingar, sum ikki vóru vanir við at arbeiða við so stórum projektum saman við altjóða ídnaði. Tað tók sína tíð at fáa tað projektið burðardygt, men eftir tað so fekk tað stóran týdning fyri Føroyar. Øll lærdu av hesum. Føroyingar lærdu at samstarva uppá tvørs í tí altjóða umhvørvinum.

Hitt, sum gleðir meg, er MRCC-støðin í Havn. Tað gleðir meg nógv, at føroyingar hava fingið sína egnu sjóbjargingartænastu, sum tykist virka væl. Tað tók sína tíð men oljutilgongdin var so medvirkandi til, at henda gjørdist veruleiki.

Ikki einsamallir

– Hvørjir eru so fyrimunirnir og vansarnir við at vera eitt so lítið samfelag, tá man fer í gongd við eina so stóra vinnu sum oljuvinnan er tað?

– Tað negativa er, at føroyingasr mugu ikki billa sær inn, at føroyingar einsamallir kunnu megna alt heita. Oljuvirksemið er eitt altjóða virksemi við nógvum ymiskum mentanum. Tað er týdningarmikið, at Føroyar taka lut í altjóða oljumentanini eisini og ikki bara sita í sínum egna dunnuhyli í Føroyum. Tað hava tað verið tekin til tíverri. Skal man vera ein tjóð sum ynskir at átaka sær at fremja egin áhugamál og tey hjá oljuídnaðinum, so má man hava altjóða áhuga og innlit.

Tað positiva er, sigur hann viðari, at oljumyndugleikarnir hava megnað at lyft uppgávuna. Oljufyrisitingin er limur av einum felagsskapi, sum eitur North Sea Offshore Autority Forum, har øll londini, sum liggja kring Norðsjógvin umrøða felags trupulleikar, og stórsta gleðin fyri Føroyar er, at man hevur fingið fulla semju við ídnaðin og myndugleikar í øðrum londum fyri ein felags standard fyri at brúka boripallar. Tað merkir, at kostnaðirnir fyri myndugleikar og feløg verða minni við tað, at ein boripallur, sum er góðkendur í Noregi, Bretlandi ella Danmark, eisini kann koma inn í føroyskan sjógv, um man hevur tey góðkendu sertifikatini. Tað er sera positivt, tí tað ger tað byrokratiska arbeiðið einfaldari.

Hvat ynskir samfelagið

– Um stórar oljukeldar verða funnar, hvat gera vit so?

– So mugu gerast konsept fyri útvinning. Tá má føroyska samfelagið taka stoðu til, um tað ynskir ein slíkan útvikling. Tað er eisini spurningurin, um nøgdirnar eru nóg stórar, so marknaðurin er áhugaður at keypa. Síðani fer ein útbygging fram, og tú fær ein oljuídnað. Tað fer at hava nógv at siga fyri Føroyar. Alex Buvik heldur tað vera týdningarmikið, at arbeiðsmegin umborð á pallunum, har framtíðar oljuvinnan verður ment, skal vera føroysk aftaná eina skiftistíð, har eisini útlendingar eru við. Slíkt virksemi krevur eisini eina stóra tænastuskipan á landi.

So eru tað skattainntøkurnar. Har eru tað politikararnir, sum skulu stýra peningastreyminum. Royndir mínar úr Noregi eru tær, at vit fingu eina yvirupphitaða økonomi, tá oljan kom, og tað tok ár at læra seg at handfara hetta. Hetta mugu føroyingar læra av. Sjálvt um tit eru smáir, so eru vit stórir nokk til at kunna handfara eina oljuvinnu.

Fleiri bein

Alex Buvik er vorðin góður við Føroyar og føroyingar eftir so mong ár her. Hann sigur, at Føroyar eru eitt sera vakurt og dramatiskt land, og hetta eyðkennir eisini føroyingar. Føroyingar eru sera hugnaligir, hava ein góðan humor men frá tíð til aðra kanska eitt sindur órealistiskir. Føroyingar eru droymarar og ynskja at gera nógv, sum kanska ikki er so væl umhugsað og so realistiskt at gera til veruleika. Tá eg hugsi um, at her liggja 18 oyggjar tveittar út í Atlantshavið við 48.000 íbúgvarum, so hevur hetta samfelagið klárað seg sera væl. Hetta er eitt robust samfelag við vælkvalifiseraðum fólki. Væl hava tey bara livað av fiskivinnu. Oljuvinna er idnaður, og føroyingar eiga helst at læra seg at eitt sindur meira av "idnaðarhugsan" og ikki bara liva við síni traditionellu veiðumanna- og fiski-mannahugsan.

Alex Buvik heldur tað vera sera vandamikið fyri eina lítla tjóð sum tí føroysku bara at hava eina vinnu at halda seg til, og tí heldur hann at tað er skilagott við eini oljuvinnu sum eitt bein aftrat at standa á. Tá niðurgangstíðir eru í einari vinnu, so er gott at hava eina aðra til at taka. Tí er sera umráðandi, at føroyingar leggja seg eftir ídnaðarvirksemi, antin tað so verður olja ella nakað annað.

FAKTA

Alex Buvik er føddur í suðurnorska býnum Kristianssand. Eftir vanliga skúlagongd fór hann til sjós, og eftir tað tók hann tekniska útbúgving í Oslo. Har var hann í nøkur ár og arbeiddi sum ráðgevi fyri eitt lítið maskinfelag. So kom oljan til Noregs, og tað helt hann vera eina spennandi avbjóðing.

Hann flutti tí til Stavanger og var við í arbeiðinum uppá fyrsta feltið, Ekkofisk, sum varð bygt út. Síðani fekk hann arbeiði hjá nýggju norsku oljufyrisitingini. Har var hann í trý ár og fór eftir tað til arbeiðis hjá oljufelagnum Amoco, har hann var í 17 ár. Stóran part av tíðini , í 9 ár, var hann pallstjóri umborð á einum boripalli á Valhallafeltinum.

Eftir hetta stovnaði hann sítt egna ráðgevarafelag, eitt nú arbeiddi hann við at selja ein boripall til Kina. Tað var tá, at Føroyar komu inn í myndina. Her var hann fyrst sum ráðgevi og síðani fekk hann ein sáttmála uppá fleiri ár. So maðurin, sum legði sær til rættis eina framtíð við oljuuppgávum í Kina, endaði í Føroyum.

Nú er Alex Buvik so farin til arbeiðis sum ráðgevi hjá grønlendsku myndugleikunum, har hann skal vera við til at skipa regulverk fyri heilsu, umhvørvi og trygdarpartin í sambandi við komandi borgingar. So skjótt borað verður aftur í Føroyum er hann tilreiðar at koma aftur hendavegin. So neyvan er seinasta orð sagt um sjarmerandi og hugnaliga oljumannin úr Noregi, Alex Buvik.



Alex Buvik, sum hevur arbeitt í Oljufyrisitingini í 8 ár

Sparið ikki meira á Oljufyrisitingini

– Nóg mikið er spart í oljufyrisitingini. Savnið og brúkið allar góðar kreftir til at taka ímóti komandi avbjóðingunum í hesi nýggju vinnu. Vil væl til verður fyrsta oljuframleiðslan veruleiki í 2014 sigur Alex Buvik, ráðgevi í oljumálum

OLJUPRÁT
Jan Müller
jan@sosialurin.fo

– Føroyska oljutilgongdin hevur verið væl løgd til rættis frá byrjan. Nógv skilagott er hent. Men neyðugt er at gera nógv fleiri kanningar, áðrenn ein kann siga um hetta verður til nakað ella ikki. Oljufyrisitingin má gera sítt til at skapa áhuga fyri økinum sigur Alex Buvik, sum seinastu árini hevur starvast á Oljufyristingini. Hann hevur tí verið tið til menningina av okkara oljufyrisiting og eisini nú farið var frá eini ráðharrastovu til fyrisiting. Fyri tíðina er oljufyristingin munandi skerd. Man hevur styrkt jarðfrøðiliga partin av oljufyritingini og tað er sera gott. Men føroyskir politikarar og myndugleikar mugu eisini hugsa um at styrkja oljufyrisitingina, soleiðis at man er fyrireikaður at taka ímóti komandi avbjóðingum. Í dag eru tað ikki mong eftir, sum klára at lyfta eina slíka uppgávu.

Alex Buvik ávarar tí ímóti enn fleiri sparingum her. Hann heldur tað var rætt at skipa tingini øðrvísi út frá galdandi fortreytum, men tað, sum er stórt spell við slíkum er, at tú missir nógv av kompetansu, og nógv av teimum dugnaligu og kompetentu fólkunum í Oljufyrisitingini eru farin aðrastaðni, tí man ikki hevur havt eitt nóg greitt og klárt mál og meining við nýggju fyrisitingini. Ein kann sjálvandi fáa nýggj fólk. Men skal tú lyfta eitt virksemi sum oljuvinna er, so hevur tú brúk fyri kompetentum fólki, bæði á jarðfrøðliga økinum og ikki minst á fyrisitingarligu síðuni. Tú skal umsita eina kolvetnislóg við teimum neyðturiviligu kunngerðunum og lógarverkinum, og tá mást tú hava góð fólk.

– Spurningurin er tí eisini, hvønn málsetning politiska skipanin hevur við eini oljuvinnu. Eg eri eitt sindur í iva um, hvussu tað verður í framtíðini, ikki minst tí at man als ikki hevur nevnt oljuna í samgonguskjalinum og harvið kann man tulka polikararnar, sum at man ætlar sær ikki at raðfesta hetta høgt. Tað vóni eg tó ikki er støðan. Styrkið heldur oljufyrisitingina, um man meinar nakað við eini oljuvinnu.

– Hvussu hava vit, her m.a. okkara oljumyndugleikar, klárað okkum í telvingini ímóti oljufeløg-unum?

– Avgjørt væl. Eg var sera ovfarin av Oljufyrisitingini, tá eg kom higar. Man hevur dugað at takla tingini rætt, og hevur Oljufyrisitingin og fólkini har gjørt eitt sera professionelt arbeiði.

Og framtíðin – hvørji eru tíni ráð?

– Keep up the good work er boðskapurin. Haldið fram við tí góða arbeiðinum.

Og Alex Buvik hevur eisini eitt boð uppá, nær fyrsta oljan rennur úr undirgrundini!

– Lat okkum siga, at tað verður borað aftur í 2006 og eitt fund verður gjørt. So skulu avmarkingarbrunnar borast, og síðani skal man meta um lønandi virksemi. Síðani tilrættaleggja eina útbygging. Henda tilgongdin, frá tí at tú hevur gjørt eitt fund til oljan rennur, fer at taka umleið 8 ár, so fyrsta oljan, í besta lagi, gerst veruleiki í 2014.

Buvik takkar øllum teimum hann hevur arbeitt saman við og fyri tað góða úrslit komið er fram til. - Hetta er eitt gott land at búgva í. Eg havi verið væl móttikin og havi fingið nógvar góðar vinir. Tað verður við sorgblíndi, at eg fari higani.